# Søgubrot úr Argjabókini

**Maður í Rituskor**
Ein abbasonur Andrass, Andreas hjá Dánjal á Argjum, var í Suðuroy eina tíð. Hann var húskallur undir Vørðubrekku í Sandvík. Andrias framdi – sum 20 ára gamal – eitt tað størsta mandómsbragd, sum er framt í Suðuroy. Tíðliga ein morgun var hann farin sjálvur triði í Rituskor at fleyga. Nú er so vorðið har, at gongt er út eftir einum bretti, ið er seks alin langt, átta tummar breitt og hálvan annan tumma tjúkt. Dýpdin undir brettinum er einar 50-60 favnar og niða er niðri við botnin. Her gingu góðir og djarvir bakkamenn leysir út í Skorina, meðan aðrir høvdu band á sær. Veðrið var gott og góð ætt, so teir væntaðu sær nógvan lunda hendan dag. Bjørgini røkti hvalbingar og sandvíkingar í felag tá. Hann, ið fyrstur varð, átti sessin fyri dagin.

Alt gongur á besta hátt, og teir seta seg í sessirnar at fleyga. Tveir ungir dreingir úr Hvalba eru eisini farnir frá húsum hendan morgun, men tá teir síggja brettið liggja, venda teir við aftur. Húsbóndi teirra gerst í øðini, tá ið hann fættir, at sandvíkingar aftur eru í Rituskor hendan dagin og sendir annan dreingin avstað aftur at taka brettið av og goyma tað.

Nú hendir tað, at hann kom av landnyrðingi, og tað fór at regna. Tað var ikki verandi í Skoruni, og teir tríggir menninir sluppu sær tí upp, men nú var einki bretti. Tað kom dátt við hjá teimum, tí sluppu teir ikki inn aftur var ikki gott at vita, hvussu endin varð.

Andrias tekur tá til tey ráð at skoyta tvær fleygastengur saman, rør so tað triðju og stangararnar upp í skoytið, leggur tær um gjónna, og hankar seg inn um eftir teimum. So fór hann til hús at fáa eitt annað bretti, so hinir báðir kundu sleppa inn um eisini, men tá møtti hann bygdarmonnum sínum, sum vóru farnir at vita, hvussu til stóð.

Andrias flutti norður um aftur og búsettist á Argjum. Hann var giftur við Sunnevu Jákupsdóttir úr Froðbæ, kallað Stóra. Sum smágenta var hon við bátinum, ið hvølvdist, tá ið Urðin á Steinum – nakað vestanfyri Froðbiarnýpu – leyp.

Tríggir bátar dyrgdu tann dagin í juli stutt fyri ólavsøku, tá ið lopið kom. Tað var so stórt, at tað merktist heilt til Lítlu Dímun. Ein bátur hvølvdist, og tveir mans umkomust, meðan hini trý, ein av teimum var 3 ára gamla Sunneva – bjargaðist. Vindur var komin undir skjúrtið hjá henni, og tí fleyt hon á tí.

**Frásøgn hjá Øssuri Eysturoy**
Øssur Eysturoy gav í ár 2000 út eina bók: "Erindringer – om udlængsel og hjemkomst", har hann greiðir frá, tá hann sum smádrongur var at vera hjá Jacob Danielsen á Argjum. Her var nógv at gera, sum at vera úti við báti og fiska, at vera á seiðabergi, at fara við kúnni og at leiða hana um morgunin út um garðarnar og heim aftur um kvøldið. Eisini dámdi honum so væl, tá Jacob gjørdi føroyskar prýðislutir, so sum grindaknívar, smúkkur, ringar, brosjur og annað. Øll amboðini, sum Jacob brúkti, hevði Øssur við sær niður til Danmarkar, og so fór Øssur sjálvur at gera føroyskar prýðislutir í Danmark.

Í bókini greiðir Øssur frá, at hann var við skipi í Spania undir borgarakrígnum. Her varð hald lagt á skipið, og tað varð væl og virðiliga svínabundið. Hann greiðir soleiðis frá:

"Militærvagt blev sat ombord. Der lå vi så indespærret i 2 uger. Men værst var det, at provianten var ved at slippe op. Der var kommet en ny hovmester ombord, men ved overtagelsen var han blevet snydt med proviantbeholdning af den fratrædende hovmester. Den eneste proviant vi fik fra land var en mager fårekrop og nogle visne grønsager. Der var jo borgerkrig, så der var intet at gøre. Men proviantmangelen ombord gik hovmesteren så meget på, at han var ved at gøre skade på sig selv. En dag havde han fået et par jernrister fra fyrpladsen, som han ville binde til benene, men heldigvis blev det opdaget, og derefter var der vagt ved ham døgnet rundt. For at fordrive tiden blev alt læsestof ombord fundet frem. Deriblandt var der et Billedblad, og det første jeg så, da jeg bladede op, var et stort billede af ægteparret på Argir, som jeg til tider boede hos som barn. De havde haft besøg af en dansk journalist og var afbildet ved et dækket frokostbord med alle de gode specialiteter. Det var som at få en frisk hilsen hjemmefra, nu vi var på smalkost i Spanien".